KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Klaksvíkar Býráð

Dagfesting: 27.10.2023 kl. 16:30
Málnr.: 21/01365 Gerðabók
Nevndarlimir: Karl Johansen, Atli S. Justinussen, Jógvan Skorheim, Gunvá við Keldu, Oddmar á Lakjuni, Jóhanna Christiansen, Eyðstein Ó. Poulsen, Óli M. Lassen, Signhild V. Johannesen, Tummas J. Lervig og Annika S. Biskopstø
Varalimir:
Ikki møtt:
Onnur: Rúni Rasmussen, kommunustjóri
Protokollførari: Jensa Anthoniussen, fulltrúi

Málsyvirlit		
Til viðgerðar		
79/23	22/01373-3	Byggisamtyktarbroyting av B18 og víðkan av verandi útfylling á Strond
80/23	23/01194-3	Byggisamtyktarbroyting fyri A18 og B9
81/23	21/01325-31	Vetrarhald 2022/23 (kavarudding) - fíggjarstøðan í okt. 2023.
82/23	21/01355-3	Lendisleiguprísir fyri bingjur
83/23	23/01227-1	Flyting av játtan, Ítróttarøkið – *flyting millum kontur, fyrra viðgerð*
84/23	23/01228-1	Flyting av játtan, Havna og vinnuøkið - *flyting millum kontur*
85/23	23/01093-4	Húsið, tørvur á meirjáttan – *flyting millum kontur, fyrra viðgerð*
86/23	23/00855-3	Nýggjur tørvur NR 2023 – *eykajáttan, seinna viðgerð*
Til viðgerðar fyri afturlatnum hurðum		
87/23	23/01102-4	Umsókn um meirøki

Til viðgerðar

79/23
22/01373-3 Byggisamtyktarbroyting av B18 og víðkan av verandi útfylling á Strond

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	16.10.2023	95/23
2 Havna- og Vinnunevndin	18.10.2023	48/23
3 Tekniska Nevnd	18.10.2023	61/23
4 Klaksvíkar Býráð	27.10.2023	79/23

22/01373-3 Byggisamtyktarbroyting av B18 og víðkan av verandi útfylling á Strond

Frágreiðing um málið:
Søkt verður um eina víðkan av útfyllingini á 2214 m^2 á Strond (82 m x 27 m).
Tvær kostnaðarmetingar eru, í aðrari metingini er alt grótið keypt, í hinari metingini verður tunnilsgrótið brúkt (tó verður dekkgrótið keypt).

Um møguleiki verður fyri at endurnýta verandi dekkgrót (flyta tað longur út), verður hendan upphæddin enn minni. Nýggja útfyllingin kemur tó at krevja meira dekkgrót, enn tað sum er í dag. Neyv útrokning er ikki gjørd av hesum, men ein leyslig meting er, at hetta kann koma at spara okkum ca. 500.000 kr.

Byggisamtyktarbroyting:
Fyri at fremja víðkanina er neyðugt at økja um økispart B18, vinnuøki.
Broytingin snýr seg um at víðka økispartin uml. 35 m út á sjógv, við uml. 5600 m^2 (160 m x 35 m). Av hesum er útfyllingin 82 m x 27 m = 2214 m^2.
Eingin broyting er í ásetingartekstinum.

Byggisamtyktarbroyting

Burðardygd og heimsmálini:
11. Mál. Gera býir og búsetingar inkluderandi, trygg, dygg og burðardygg.

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir v.m.

Fíggjarligar avleiðingar:
Verður útgangsstøði tikið í kostnaðarmetingini við tunnilsgrótinum, er kostnaðurin fyri verkætlanina 4.289.460 kr. Um møguleiki er fyri at endurnýta verandi dekkgrót, og útgangsstøðið verður tikið í leysligu metingini frá ráðgevaranum, kann hetta spara okkum á leið 500.000 kr. Tá verður kostnaðurin fyri verkætlanina 3.789.460 kr.

Eingin játtan er í verandi ári.

Tilmæli:

1. Vinnudeildin mælir nevnd og býráð til at taka støðu til, um arbeiðast skal víðari við málinum,
2. Fíggjarligi parturin verður latin nevnd og býráð at umrøða, um verkætlanin skal fíggjast í 2024.
3. Um samtykt verður at arbeiða víðari við verkætlanini, verður mælt til at játta umsitingini heimild at fara undir byggisamtyktartilgongdina.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 16. oktober 2023:
Nevndin tekur undir við, at farið verður undir byggisamtyktartilgongdina.
Fíggjarligi parturin verður at taka upp í samband við fíggjarætlanararbeiðið 2024.

Havna- og Vinnunevndin 18. oktober 2023:
Tummas Lervig luttók ikki við í viðgerðini av málinum vegna ógegni.
Nevndin tekur undir við UBN, dagf. 16-10-2023

Tekniska Nevnd 18. oktober 2023:
Tummas J. Lervig luttók ikki við í viðgerðini av málinum vegna ógegni.
Nevndin tekur undir við HaVN 18-10-2023.

Klaksvíkar Býráð 27. oktober 2023:
Tummas J. Lervig luttók ikki við í viðgerðini av málinum vegna ógegni.
Tilmælið frá TN 18-10-2023 einmælt samtykt.

80/23
23/01194-3 Byggisamtyktarbroyting fyri A18 og B9

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	16.10.2023	94/23
2 Havna- og Vinnunevndin	18.10.2023	47/23
3 Klaksvíkar Býráð	27.10.2023	80/23

23/01194-3 Byggisamtyktarbroyting fyri A18 og B9

Frágreiðing um málið:
Klaksvíkar sleipistød søkir um byggisamtyktarbroyting fyri matr.nr. 1009b, Klaksvík.
Broytingin snýr seg um at víðka A18 (blandað íbúðar- og vinnuendamál), so matr.nr. 1009b verður partur av A18 og ikki B9 (vinnuøki).

Broytingin kemur av, at KSS umhugsar at byggja eina hædd oman á verandi bygning til skrivstovuendamál. Undirhæddin verður framvegis nýtt til verkstað.
Verandi bygningur hevur nátt mest loyvdu hædd sambært ásetingunum fyri øki B9. Mest loyvda hædd: *bygningshædd í mun frá bryggjukanti er 13 m.*

Burðardygd og heimsmálini:
11. Mál. Gera býir og búsetingar inkluderandi, trygg, dygg og burðardygg.

Lógargrundarlag:
Økisparturin A18 loyvir nýtslu innan blandað íbúðar- og vinnuendamál.

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar

Tilmæli:
Umsitingin mælir nevnd og býráð til at fara undir byggisamtyktartilgongdina.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 16. oktober 2023:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 09-10-2023.

Havna- og Vinnunevndin 18. oktober 2023:
Nevndin tekur undir við UBN, dagf. 16-10-2023

Klaksvíkar Býráð 27. oktober 2023:
Tilmælið frá HaVN 18-10-2023 einmælt samtykt.

81/23
21/01325-31 Vetrarhald 2022/23 (kavarudding) - fíggjarstøðan í okt. 2023

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Tekniska Nevnd	18.10.2023	60/23
2 Fíggjarnevndin	24.10.2023	82/23
3 Klaksvíkar Býráð	27.10.2023	81/23

21/01325-31 Vetrarhald 2022/23 (kavarudding) - fíggjarstøðan í okt. 2023

Frágreiðing um málið:
Fyrr í ár vóru TN og FíN kunnaðar um serligu avbjóðingina við kava, sum var frá desember 2022 til apríl 2023. Nevndirnar samtyktu tá, at málið skuldi takast upp aftur seinni í ár.

Í løtuni er eitt yvirtrekk á kavaruddingarkontuni upp á 1,2 mió. kr. Væntast kann, at yvirtrekkið gerst uppaftur størri kanska upp í móti 1,6 mió. kr. við árslok. Um hugt verður eftir ársúrslitum seinastu mongu árini, er hetta als ikki ókent fyribrygdi hjá kommununi, at vetrarhaldið kostar nógv í seinasta kvartali.

Burðardygd og heimsmálini:
At fremja kavarudding í einum samfelag, har tørvur er, hevur stóran týdning, og stuðlar hetta átakið væl undir heimsmál fyri burðardyggari menning, t.d. mál nr. 11, at gera býir og búsetingar inkluderandi, trygg, dygg og burðardygg. Málið hevur týdning fyri tilbúgvingina hjá kommununi, sum eisini er partur av heimsmálunum og burðardygd.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Málið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri tekniska økið í 2023, tí fleiri rakstrarjáttanir á tekniska økinum eru teprar, og trupult er at finna fíggingina til meirkostnaðin innan tekniska rakstrarøkið. Um hugt verður mong ár aftur í tíðina, so hevur tað ikki verið óvanligt hjá kommununi at taka eitt staðfest yvirtrekk á kavaruddingarkontuni til eftirtektar. Tá hevur tað tó ikki verið talan sum so stóra samlaða nýtslu á kontuni.

Tilmæli:
Vanlig mannagongd hjá kommununi hevur verið at taka staðfest yvirtrekk á kavaruddingarkontuni til eftirtektar.
Tekniska Fyrisiting kann viðmæla, at yvirtrekkið pr. 1. oktober 2023 – 1,2 mió. kr. - verður tikið til eftirtektar.

Tekniska Nevnd 18. oktober 2023:
Nevndin tekur yvirtrekkið á kavagrevstrarkontuni, 1,2 mió.kr. pr. 1/10-2023, til eftirtektar.

Fíggjarnevndin 24. oktober 2023:
Nevndin tekur undir við TN 18-10-2023.

Klaksvíkar Býráð 27. oktober 2023:
Tilmælið frá FíN 24-10-2023 einmælt samtykt.

82/23
21/01355-3 Lendisleiguprísir fyri bingjur

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	24.10.2023	88/23
2 Klaksvíkar Býráð	27.10.2023	82/23

21/01355-3 Lendisleiguprísir fyri bingjur

Frágreiðing um málið:
Havna- og vinnunevndin samtykti á fundi 10. nov. 2021 at broyta prísstøðið fyri stutttíðarleigu fyri bingjur. Málið kom tó ikki víðari í nevndarskipani, og tí verður hetta nú lagt fyri fíggjarnevnd og býráð.

Burðardygd og heimsmálini:
Mál nr. 9. → Vinna, nýskapan og undirstøðukervi.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ein ávís inntøka til Klaksvíkar Havn

Tilmæli:
Mælt verður til, at tikið verður undir við broytta prísstøðinum, eins og Havna-og vinnunevndin gjørdi á fundi 10.11.2021.

Fíggjarnevndin 24. oktober 2023:
Nevndin tekur undir við HaVN 10-11-2021.

Klaksvíkar Býráð 27. oktober 2023:
Tilmælið frá FíN 24-10-2023 einmælt samtykt.

83/23
23/01227-1 Flyting av játtan, Ítróttarøkið – *flyting millum kontur, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Mentanarnevndin	17.10.2023	63/23
2 Fíggjarnevndin	24.10.2023	85/23
3 Klaksvíkar Býráð	27.10.2023	83/23
4 Klaksvíkar Býráð	23.11.2023	

23/01227-1 Flyting av játtan – Ítróttarøkið

Frágreiðing um málið:
Hitavekslarin, sum ætlandi skuldi setast upp í svimjihøllini, verður kortini ikki uppsettur; og onnur spariátøk eru tí gjørd.
Tí verður nú spurt um at flyta upphæddina 527.385 kr. av játtanini *Svimjihøllin, íløga* til *leikvøllur á Másheyggi, íløga*. (frá rakstrarstaði 05246170120 til 05246270192).

Burðardygd og heimsmálini:
Hetta málið stuðlar undir heimsmál nr. 3 at tryggja øllum heilsugott lív og virka fyri trivnaði fyri øll í øllum aldri.

Lógargrundarlag:
Fíggjarætlan 2023

Fíggjarligar avleiðingar:
Fluttar verða 527.375,- frá rakstrarstaðið 05246170120 til rakstrarstað 05246270192

Tilmæli:
Mælt verður til, at nevndin tekur undir við at flyta upphæddina til annað rakstrarstað.

Mentanarnevndin 17. oktober 2023:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 09-10-2023

Fíggjarnevndin 24. oktober 2023:
Nevndin tekur undir við MeN 17-10-2023.

Klaksvíkar Býráð 27. oktober 2023:
Annika S. Biskopstø tók ikki lut í viðgerðini vegna ógegni.
Tilmælið frá FíN 24-10-2023 einmælt samtykt.

84/23
23/01228-1 Flyting av játtan, Havna og vinnuøkið - *flyting millum kontur*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Havna- og Vinnunevndin	18.10.2023	45/23
2 Fíggjarnevndin	24.10.2023	86/23
3 Klaksvíkar Býráð	27.10.2023	84/23

23/01228-1 Flyting av játtan – Havna og vinnuøkið

Frágreiðing um málið:
Á fíggjarætlanini eru 500.000 kr settar av á *Havnin íløga* til fyrireiking av sølutorgi, men fyrireikingararbeiðið er ikki komið nóg langt áleiðis, at hendan játtan kann brúkast til endamálið. Tískil verður biðið um loyvi at flyta játtanina til bátadráttin úti í Klaksvík. Bátadrátturin er so brattur, at hann er vandamikil at nýta. Fyribils kostnaðarmetingar siga, at kostnaðurin fyri at fáa hetta í rættlag er 535.000,-.

Burðardygd og heimsmálini:
Hetta málið stuðlar undir 9. heimsmál um at byggja varandi undirstøðukervi, virka fyri inkluderandi og burðardyggari ídnaðarmenning og eggja til nýhugsan.

Lógargrundarlag:
Fíggjarætlan 2023

Fíggjarligar avleiðingar:
Av tí at 33.000,- eru brúktar ísv. fyrireikingararbeiði til sølutorg, eru 470.000,- tøkar at flyta frá hesi verkætlan (HV020) til eina nýggja verkætlan dráttur úti í Klaksvík.
Báðar verkætlanirnar liggja undir Havnin íløga 07381470141.

Tilmæli:
Mælt verður til, at nevndin tekur undir við at flyta 470.000,- til íløgu dráttur úti í Klaksvíksgarðinum.

Havna- og Vinnunevndin 18. oktober 2023:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 09-10-2023

Fíggjarnevndin 24. oktober 2023:
Nevndin tekur undir við HaVN 18-10-2023.

Klaksvíkar Býráð 27. oktober 2023:
Tilmælið frá FíN 24-10-2023 einmælt samtykt.

85/23
23/01093-4 Húsið, tørvur á meirjáttan – *flyting millum kontur, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	17.10.2023	48/23
2 Fíggjarnevndin	24.10.2023	83/23
3 Klaksvíkar Býráð	27.10.2023	85/23
4 Klaksvíkar Býráð	23.11.2023	

23/01093-4 Húsið – tørvur á meirjáttan (flyting millum kontur)

Frágreiðing um málið:
Í september fundarumfarinum varð viðfesta tilmæli lagt fyri avvarðandi nevndir, ið gjørdu hesar samtyktir:

> Trivnaðarnevndin Børn og Ung 19. september 2023: Nevndin tekur undir við tilmælinum frá umsitingini dagfest 11.09.2023.
>
> Fíggjarnevndin 26. september 2023: Málið verið til kunningar og beint aftur í umsitingina at útgreina flyting millum kontur nærri.

Umsitingin hevur síðani arbeitt við málinum saman við leiðsluni fyri Húsið, og er ein dagførd fíggjarstøða nú sett upp og viðfest hesum tilmæli.

Burðardygd og heimsmálini:
-

Lógargrundarlag:
-

Fíggjarligar avleiðingar:
Sí uppgerðina.

Tilmæli:
Vísandi til viðfestu dagførdu fíggjaruppgerð, verður mælt til, at tann har upplýsta upphæddin verður flutt millum kontur – frá *Barnaansing felags* til *Húsið* – og at upphæddin verður staðfest í nevndarsamtyktini.

Trivnaðarnevndin Børn og Ung 17. oktober 2023:
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá umsitingini dagfest 09.10.23 og við viðfestu dagførdu skjølum dagfest 13.10.23, har mælt verður til at flyta kr. 220.000 millum kontur frá *Barnaansing felags* til *Húsið*, ímeðan restin verður staðfest sum meirnýtsla hjá Húsinum fyri 2023.

Fíggjarnevndin 24. oktober 2023:
Nevndin tekur undir við B&U 17-10-2023.

Klaksvíkar Býráð 27. oktober 2023:
Tilmælið frá FíN 24-10-2023 einmælt samtykt.

86/23
23/00855-3 Nýggjur tørvur NR – *eykajáttan, seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	19.09.2023	44/23
2 Fíggjarnevndin	26.09.2023	72/23
3 Klaksvíkar Býráð	28.09.2023	72/23
4 Klaksvíkar Býráð	27.10.2023	86/23

23/00855-3 Nýggjur tørvur NR – eykajáttan 2023

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 28. sept. 2023.

Lógargrundarlag:
Dagstovnalógin, § 5. Børn við serligum tørvi hava rætt til tilboð um pláss á dagstovni og dagrøkt á jøvnum føti við onnur børn, sum búgva í kommununi, sambært § 3. Stk. 2. Til børn við serligum tørvi verða veittar nøktandi hølisumstøður og námsfrøðilig tilboð. Stk. 3. Í ivamálum um tilboð skal veitast sambært hesi lóg, skal málið ávísast víðari til Almannaverkið, ið tekur avgerð.

Kommunustýrislógin, § 41. Kommunustýrið hevur játtanarmyndugleikan. Ikki kann verða farið undir eitt arbeiði, fyrr enn neyðug játtan er tøk.

Fíggjarligar avleiðingar:
NR hevur saman við avvarðandi myndugleikum, lækna v.m. gjørt eina niðurstøðu, sum fíggjarliga merkir hesar eykaútreiðslur:

- Genta 1 krevur at fáa eina hjálp í stovuni á Dr. Marg. Barnagarði, har hon skal í vøggustovu frá ½ august, sum er 30 tímar/viku = 24.000 kr./mán.
- Genta 2 krevur at fáa eina hjálp í tí stovuni, har hon fær pláss (verður avgjørt seinni) frá 1. september, sum er 30 tímar/viku = 24.000 kr./mán.

Sostatt er her talan um fylgjandi nýggjar útreiðslur hjá NR:

	August	September	Oktober	November	Desember	Samlað 2023
Genta 1	12.000 kr.	24.000 kr.	24.000 kr.	24.000 kr.	24.000 kr.	**108.000 kr.**
Genta 2	0 kr.	24.000 kr.	24.000 kr.	24.000 kr.	24.000 kr.	**96.000 kr.**
	12.000 kr.	**48.000 kr.**	**48.000 kr.**	**48.000 kr.**	**48.000 kr.**	**204.000 kr.**

Framman undan hesum er NR hart spert fíggjarliga við verandi játtan, og tí er ikki fíggjarligt rásarúm til hesar nýggju eykaútreiðslur innan verandi játtan.

Tilmæli:
Vísandi til viðfesta tilmælið og omanfyristandandi, verður mælt til, at 200.000 kr. verða fluttar millum rakstrarkontur, frá 03261170030 “Barnaansing felags” til 02211370040 “NR Námsfrøðiliga ráðgevingin”.

Trivnaðarnevndin Børn og Ung 19. september 2023:
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá umsitingini dagfest 11.09.2023.

Fíggjarnevndin 26. september 2023:
Nevndin tekur undir við B&U 19-09-2023.

Klaksvíkar Býráð 28. september 2023:
Tilmælið frá FíN 26-09-2023 einmælt samtykt.

Klaksvíkar Býráð 27. oktober 2023:
Tilmælið frá BýR 28-09-2023 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

FRAMMANFYRI STANNDANI MÁL ERU VIÐGJØRD Á ALMENNUM FUNDI

87/23
23/01102-4 Umsókn um meirøki

Fundurin lokin kl. 17:30